*Bjarti Mohr, stjóri um oljuskrivingina:*

# Heilaspuni

*-Eg havi vitjað AP Møller nakrar ferðir, og tað var í ørindum fyri Fiskasøluna í sambandi við flutning av fiski. Eg havi einki við oljuvinnu at gera og ætli mær tað heldur ikki. Eg havi heldur ikki tosað við Tummas Arabo um oljuvinnu ella avtalur við danir um olju. Hetta er tann reini heilaspuni. Eg siti við báðum hondum fullum av fiski og ætli mær ikki inn í nakra oljuvinnu.*



Sigur Bjarti Mohr, stjóri í Føroya Fiskavirking, sum nú í fleiri greinum í Oyggjatíðindum er skuldsettur fyri í loyndum at hava havt fundir við AP Møller um føroysku undirgrundina og brúksrættin til komandi oljuna.

-Tað er ófatiligt, at eitt blað uttan nakað hald í veruleikanum skal tveita slíkar gitingar út til lesararnar. Tá teir hongja meg út kundu teir at havt ómakað sær við at spurt meg, um nakað varð í hesum, men blaðið hevur ikki sett seg í samband við meg. Havi eg ikki verið at hitta kundu teir lagt boð, men tað hava teir ikki gjørt.

Bjarti Mohr sigur, at hann hevur hitt McCinney Møller, sum er ein sera fryntligur maður. Men vit tosaðu ikki um olju. Eg má tí harðliga vísa aftur øllum gitingum í hesum máli sum tann reini heilaspuni.

jan

**Mintust til til haldaragjaldið !**

SEINASTI SPURNINGUR
í kappingini

**15 SPURNINGAR UM SKOTLAND**

verður í blaðnum
**FRÍGGJADAGIN 1. OKT.**



**14. Spurningur**

Er skotska hálendið fyri norðan ella sunnan?

Svar ____________

Fyri at vera við í lutakastinum um

**10-DAGA SKOTLANDSFERÐ**

v/ bili & børnum undir 14 ár og uppihaldi á trimum frálíkum skotskum hotellum í eina viku

**2 SNARFERÐIR FYRI TVEY**

til Aberdeen

**10 SKOTSK TURRIKLØÐ**

og **4 SWEAT SHIRTS**

skulu tit bert svara 15 spurningum um Skotland. Spurningarnir hava verið í blaðnum dag um dag og tann seinasti verður í blaðnum í morgin, fríggjadagin 1. oktober.

Greinin á síðu 16 & 17 í hósdagsblaðnum 9. sept. hjálpir tykkum at svara spurningunum.

**STRAX – STRAX – STRAX**

Sendið beinanvegin teir 15 svaraðu spurningarnar til
**SOSIALURIN, Box 76, 110 Tórshavn**
við sendaranavni, bústaði og tlf. nr.

**Bert 15 svaraðar spurningar í hvønn bjálvan.** Eru fleiri í einum húski, ið senda inn, mugu tey nýta hvør sín bjálva.

**Drigið verður mánadagin 4. okt.**

Bjálvar til dráttin mugu tí vera okkum í hendi í **SEINASTA LAGI við postinum mánamorgunin 4. okt.**

Latið ikki vikuskiftið fara, men sendið okkum kappingarbjálvan so skjótt 15. spurningur er svaraður.

*Úr Havn til Danmarkar:*

# Trý fólk av landinum um dagin

## *Í september komu tíggju fólk úr Danmark til Havnar og 85 fóru av landinum*

Føroyingar eru veruliga vorðnir flytifuglar, og hendan gongd tykist bert at vinda uppá seg.

Í september eru 70 fólk komin til Havnar úr øðrum kommunum í Føroyum, og 40 havnarfólk eru flutt úr Havnini í aðra føroyska kommunu. Hendan mánaðan eru samstundis tíggju fólk flutt heimaftur til Havnar úr Danmark, og 85 farin til Danmarkar.

Í løtuni eru 14.250 fólk í Havn. Hetta eru umleið 600 færri enn við ársbyrjan.

Men enn færri høvdu havnarfólkini verið um ikki so mong komu til Havnar úr øðrum kommunum í Føroyum. Bert síðani 1. januar eru 600 fólk komin til Havnar úr øðrum føroyskum kommunum. 230 fluttu úr Havnini í aðrar kommunur í Føroyum.

Higartil eru 890 fólk farin úr Havn til Danmarkar og 110 komin heimaftur.

Í september eru 110 fólk flutt úr einum bústaði í annan í Havn.

tor.-




*Vælkomin til Havnar, stendur á skeltinum, og hesum tilboði taka eisini fleiri ímóti*

**Blindastovnur Føroya**
hevur opið mándag–fríggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19288.

**Eliaskirkjan, Vesterbrotorv 49**
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19.00.
Bussarnir 6, 16, 28 og 41 steðga nærindis.
Nærri tæst at vita á tlf. 031-242268 ella 031-578999.